# Hólmgongan náddi ikki hæddina



*Hólmgonga: Tað var ringt at síggja, hvar Jóannes endaði og Høgni byrjaði, tá teir hittust til hólmgongu mikukvøldið í Føroyahúsinum.*

*Mynd: Símun J. Hansen*

**Tað var almikið av fríggi og fjasi í luftini, tá MFS setti Jóannes Ejdesgaard løgmann og Høgna Hoydal, løgtingsmann, at kjakast mikukvøldið, men teir vóru so samdir, at neistarnir aldrin av álvara fóru at fúka í Føroyahúsinum**

POLITIKKUR
*Marjun Dalsgaard*

Kjakið millum Jóannes Ejdesgaard løgmann og Høgna Hoydal, løgtingsmann í Føroyahúsinum mikukvøldið skuldi eitast at vera hólmgonga millum tveir av okkara sjónligastu politikarum. Men markið fyri hvar Jóannes endaði og Høgni byrjaði var einki serliga týðiligt, tá fundurin var lokin.

Tónin var eitt sindur lættari enn til vanligar fundir, men tað kom ikki rættiligt flog yvir trætunar.

Teir báðir vóru stórt sæð samdir um alt, sum varð kjakast um í fyrru helvt av fundinum, og tískil var ikki nógv veiggj í fyrr enn eftir steðgin, tá yvirtøkulógin kom á borðið og her var, sum Jóannes Ejdesgaard segði:

– Tað einasta vit eru ósamdir um er exit.

Áðrenn steðgin vórðu evnini gransking og útbúgving, frí fosturtøka og skrásett paralag á lofti.

Teir vóru samdir um, at vit eru eftirbátar í altjóðagerðini. Teir vóru samdir um, at gransking tí skal raðfestast høgt og samskipast, so vit fáa neyðuga vitan og ikki verða tikin á bóli, hvørja ferð fiskaprísurin lækkar. Teir vóru so gott sum eisini samdir um, hvussu hetta skal gerast.

### Eingin broyting

Eisini viðvíkjandi fosturtøku og skrásettum paralagi vóru teir báðir samdir - og samdir um, at okkurt skal gerast, men at einki ítøkiligt er at gera fyribils á hesum økinum, tí føroyska samfelagið er stirvið og konservativt, og aðrir politikarir blokera fyri at málini koma fyri í tinginum. Evnini skulu fram í ljósmálan og mýkjast, so tað einaferð verður ørvísi.

Løgmaður rósti Høgna fyri at hava sett grunnleggjandi virðini undir Føroyska samfelagnum á skránna, og Høgni rósti løgmanni fyri at bera tað víðari.

Eftir steðgin, tá yvirtøkulógin og uttanríkismál komu á skránna kom so dánt meira lív í kjakið, tí nú snúði tað seg nevniliga um exit. Kortini var enn ikki heilt greitt, hvør tann stóri munurin á politikkinum var.

– Yvirtøkulógin er at gera Tvøroyrarskjalið, sum Høgni Hoydal í 2002 kallaði sjeymílafer móti fullveldi, til veruleika, segði Jóannes Ejdesgaard.

– Tað var nakað heilt annað, tí tá var tað ein liður í nøkrum øðrum segði Høgni Hoydal og helt fast við at yvirtøkulógin er eitt afturstig.

– Við henni góðtaka vit, at vit einki hava at siga í uttanríkismálum uttan so, at vit spyrja danir fyrst, seðgi Høgni.

– Vit hava einki at siga í uttanríkismálum uttan so, at vit spyrja danir fyrst, segði Jóannes Ejdesgaard.

– Løgmaður er visiónsleysur segði Høgni Hoydal.

– Høgni Hoydal er veruleikafjarður, segði løgmaður.

### ES glotti

Í spurninginum um ES, var tó ein glotti - Jóannes vildi ikki nokta fyri, at Føroyar eiga at fara inn í ES-felagsskapin, men hesum er Høgni Hoydal so rungandi ósamdur í - Føroyar, Grønland, Ísland og Noreg skullu í felag skapa ein miðdepil, tí ES er konstruerað til stór lond á meginlandinum. Hetta krevur tó, at Føroyar og Grønland eru sjálvstøðug, og so vóru vit aftur í, at Høgni Hoydal er veruleikafjarður - og Jóannes visiónsleysur - tí tað vórðu teir samdir um at vera ósamdir um.

Sum so er einki nýtt - ella møguliga er tað nýggja, at vit vita, at Jóannes Ejdesgaard og Høgni Hoydal eru samdir um ein heilan hóp - bara ikki exit.

Men júst hetta verður vekk í dagliga keglinum, og tí var tiltakið upplýsandi. Ein orsøk til hetta var helst, at tað ikki var loyvt at seta munnligar spurningar undir fundinum, men tú kundi ístaðin skriva teir á ein lepa, sum so var latin fyrireikarunum. Hetta førdi við sær, at kjakið kundi tykjast einshátta, men gjørdi eisini, at tað ikki fór av sporinum, og tú fekk eina greiðari mynd av, hvar luttakarirnir stóðu, tí eingin kundi órógva teir - ella bjarga teimum. Onkrar royndir vórðu gjørdar frá báðum partum at messa 50 ára gamlar vanar hjá hinum partinum uttan nakra serliga motivation, annað enn, at tað vóru teir ósamdir um, men tað fall til jarðar hvørja ferð, tí rúmið var ov lítið og teir vóru ov fáir.

### Politikkur og undirhald

Samanumtikið ein sera væleydnað roynd at seta politikarar yvirav hvørjum øðrum við íblástri frá USA, sum fyrireikarirnir sjálvir tóku til. Danir hava eisini siðir við hólmgongum, til dømis drógu Holger K. Nielsen og Uffe Elleman Jensen mangan dana frá húsum til tílíkar tveymannstrætur fyrst í 90´-unum, og tað er møguliga mest samanborið við hesar, at hólmgongan mikukvøldið tóktist eitt sindur spøk - tann formligi, teknokratiski stílurin varð ikki av álvara lagdur til viks, hóast orðavalið til tíðir var meira skemtingarsamt enn vanligt. Eitt nú, tá Joannes segði, at um tú ikki fær tann, tú elskar, mást tú elska tann, tú fær og greiddi Høgna frá, at hann bert valdi ein annan, tí at Høgni valdi nakað annað.

– "Eg valdi ikki nakað annað" koketeraði Høgni og hugdi niður í gólvið til stóra frøði fyri áhoyrararnar, og vistu tú ikki betur, hugsaðu tú kanska í eitt sekund: Eitt fitt par.

Hóast tað var MFS, sum skipaði fyri, var ikki tann stóri áhugin millum tey heilt ungu, men hølið var kortini fult. Beinta Løve Jacobsen kom væl frá sínari uppgávu sum stýrari av kjakinum, hóast tú fekk varhugan av, at tað bert var inntil teir royndu politikarirnir ikki høvdu hug at lata seg stýra longur og byrjaðu at tosa uttan mun til, hvat hon segði - tá blóðið umsíðir varð blivið heitt. Men tá var tíðin farin - tíverri.

Jensina Olsen:
## Eingin vann



– Eg haldi, at tiltakið er sera væl fyriskipað, og at tað var gott, at fundurin var so væl stýrdur. Hetta at áhoyrarirnir ikki kundu blanda seg gjørdi, at politikarirnir fingu tíð til at fara í dýptina við teimum evnunum, sum vóru á skránni, tað skapar ein intimitet sum smittar, og tað gjørdi, at folk konsentreraðu seg meira.

*Hvør vann hólmgongdina?*

Eg haldi ikki, tú kanst siga, at nakar vann, men Jóannes Ejdesgaard dugdi sera væl at seta Høgna uppá pláss við stuttligum anekdotum - men tað dugdi Høgni hinvegin eisini.

Annfinnur Heinesen:
## Tannleysur fundur



– Tað er sera týdningarmikið, at eitt tílíkt tiltak verður hildið í Danmark, so vit ikki vera heilt avskorðin frá tí, sum hendir í Føroyum. Men eg haldi, at tað er spell, at tað ikki var møguleiki fyri at seta munnligar spurningar - tað er sera óføroyskt. Fundurin bleiv tannleysur og ófarligur, tí vit ikki fingu subjektivitetin inn við spurningum frá áhoyrarum, sum kunnu geva politikarunum aðrar avbjóðingar. Eg haldi, at Beinta kláraði seg sera væl, og um tú spyrt hvør vann, sigi eg Høgni. Jóannes Ejdesgaard var alt ov teknokratiskur og gráur.

Hendrik Egholm:
## Høgni vann



– Sera væleydnað tiltak, hóast fyrra helvt var eitt sindur spøk - teir voru alt ov samdir, men eg haldi, at seinna helvt var sera undirhaldandi.

*Hvør vann?*

Høgni vann. Hann dugdi sera væl at venda tí, sum Jóannes segði ímóti honum sjálvum, men Jóannes tosaði harðari. Eg haldi, hetta er sera gott, eg havi fingið eina klárari mynd av til dømis hvørjum Jóannes Ejdesgaard stendir fyri, og eg haldi at tað var gott, at tað ikki var loyvt at seta spurningar úr salinum. Kjakið kundi tó verið betur stýrt. Onkuntíð vóru teir kvettir av ov skjótt, og onkuntíð fingu teir ov langar teymar